# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 22. desember 2009

## Beckham aftur á Old Trafford

Lutakastið til áttandaparts-finalurnar í Champions League fríggjadagin lagaði seg soleiðis, at Manchester United skal spæla ímóti AC Milan, og Chelsea og Inter bresta saman, fyri at nevna teir báðar mest áhugaverdu dystirnar. David Beckham, sum í mong ár var stóra stjørnan hjá Manchester United, men sum næstu tíðina skal spæla við italska AC Milan, hevur ynskt sær at spælt ímóti gamla felagi sínum, og tað sleppur hann nú. José Mourinho, sum nu venur Inter í Italia, skal spæla ímóti fyrrverandi felagi sínum, Chelsea úr Onglandi.

**Áttandapatsfinalurnar:**

VfB Stuttgart - Barcelona
Olympiakos - Bordeaux
Inter - Chelsea
Bayern München - Fiorentina
CSKA Moskva - Sevilla
Lyon - Real Madrid
FC Porto - Arsenal
AC Milan - Manchester United

## Liverpool skal til Rumenia

Lutakast var eisini fríggjadagin um dystirnar í Europa League, har millum annað FC Keyp-mannahavn skal spæla ímóti franska Marseille, Ajax Amster-dam tekur ímóti Juventus og Liverpool trekti rumensku Uni-rea Urziceni. Fyrsti dysturin hjá Liverpool verður spældur á Anfield, tí Liverpool ikki var millum tey styrkismettu liðini. Hetta er eitt gott lutakast fyri Liver-pool, sum sleppur undan at møta liðum sum Juventus, Roma, Valencia, Benfica og PSV Eind-hoven. Fulham skal spæla ímóti Shaktar Donetskt úr Ukraina.

**Sekstandapartsfinalurnar:**

Everton - Sporting Lissabon
Rubin Kazan - Hapoel Tel Aviv
Twente - Werder Bremen
Standard Liege - Salzburg
Villarreal - Wolfsburg
Lille - Fenerbahce
Club Brugge - Valencia
Ajax - Juventus
FC København - Marseille
Hertha Berlin - Benfica
Athletic Bilbao - Anderlecht
Fulham - Shakhtar Donetsk
Panathinaikos - Roma
Atletico Madrid - Galatasaray
Hamburger SV - PSV Eindhoven
Liverpool - Unirea Urziceni

# Føroyar á fimta plássi



**Eftir at hava tapt báðar dystirnar í bólkaspælinum ímóti Finnlandi og Ong-landi, vunnu føroysku U17-genturnar í morgun 3-1 á Íslandi í dystinum um fimta plássið**



Hilmar Jan Hansen

Tað var við samanbitnum tonnum, at føroysku kvinnurnar fóru á vøllin ímóti Íslandi tíðliga í morgun, tí tær høvdu sett í seg, at nú skuldi altso vinnast. Vanliga plaga Føroyar at hava munin á Íslandi, og tað vísti seg eisini at vera so hesa ferð.

Byrjanin var tó einki serlig og Ísland vann fyrsta sett 25-10. Serliga vóru tað servurnar, ið koyrdu illa hjá føroyska liðnum, og tá tær íslendsku fingu møguleikan at spæla við, tóku tær av. Men longu í øðrum setti var gongdin vend, og Føroyar smurdu Ísland av, 25-11. Í triðja setti fylgdust liðini allan vegin uppeftir, men í síðsta enda høvdu tær føroysku munin og vunnu 25-21.

Nú vóru Føroyar á odda 2-1 í sett-um, men í fjórða setti kom stígur í, og leingi bendi alt á, at hetta skuldi gerast ein fimmsettari. Ísland var langt frammanfyri, tá Føroyar endi-liga fingu vind í seglini, og nú vóru tað servurnar, ið gjørdu munin. Annika Mikkelsen hevði 11 góðar servur á rað, og so vóru Føroyar brádliga við aftur og vunnu at enda settið 26-24 og dystin 3-1.

### Heimaftur í morgin

Hetta var kærkomin sigur hjá U17-landsliðnum, sum í bólkaspælinum hevði tapt fyrst 0-3 fyri Finnlandi, ið altíð stendur seg væl, og síðani 1-3 fyri Onglandi, sum við stórum og støðugum spælarum og betri samanspæli vann við settunum 17-25, 15-25, 25-20 og 20-25.

Ongland kom sostatt í hálv-finaluna, har tað tó gjørdist eitt 1-3 tap fyri Svøríki, meðan Finnland í síni hálvfinalu vann 3-1 á Danmark. Sostatt skuldi finalan í kappingini um norðureuropeiska meistaraheit-ið spælast klokkan 13 í dag millum Finnland og Svøríki.

Føroysku U17-kvinnurnar hugdu at finaluni, áðrenn tær so smátt byrjaði at pakka og gera seg klárar til heimferðina. Tær fara tíðliga í morginári við toki úr Ikast, og so seinni í morgin liggur leiðin heim-aftur til Føroya við flogfari.

# Trý juniormet í svimjing

**Í svimjikappingini »SMS Christmas Sprint 2009«, sum Havnar Svimjifelag skipaði fyri leygardagin og sunnudagin, vórðu trý juniormet sett**



Hilmar Jan Hansen

Hetta var helst seinasta kappingin, har føroysku svimjararnir sluppu at svimja í sokallaðu »superbúnunum«, sum tað ikki verður loyvi longur at brúka í kappingin undir altjóða svimjisambandinum, FINA, eftir 1. januar komandi. Men um vikuskiftið vóru búnarnir framvegis við, og millum annað spurdust trý nýggj juniormet burtur úr kappingini.

Birita Debes betraði sítt juniormet í 50 metra ryggsvimjing við 16 hundraðpørtum, so tað nú er 29.46 sekund. Tað merkti samstundis, at hon megnaði kravtíðina til EM, sum verður í Budapest komandi summar. Yvirhøvur gjørdi Birita nógv um seg um vikuskiftið, tí hon átti sjey av teimum 18 bestu FINA-úrslitunum í kappingini.

Eisini setti Magnus Jákupsson juniormet í 200 metra ryggsvimjing við tíðini 2:09.14 minuttir, sum sam-stundis var 26 hundraðpartar undir kravtíðini. Og at enda megnaði Pauli Øssursson Mohr at svimja so skjótt í 50 metra bringusvimjing, at hann við tíðini 30.09 sekund tók gamla juniormetið hjá Páli Joensen, sum varð sett í einari kapping í Vági í fjør við tíðini 30,39 sekund.

Á talvuni við síðuna av síggjast 18 tey bestu FINA-úrslitini í »SMS Christmas Sprint 2009«.

### Bestu FINA-úrslitini

| Nr | Navn | Felag | Grein | Tíð | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Birita Debes | Flot | 50 m rygg | 0:29.46 | 740 |
| 2 | Pauli Øssursson Mohr | FS | 50 m bringa | 0:30.09 | 676 |
| 3 | Birita Debes | Flot | 50 m frí | 0:27.45 | 650 |
| 4 | Andrass Thomsen | HS | 200 m frí | 1:58.58 | 639 |
| 5 | Birita Debes | Flot | 100 m frí | 1:00.92 | 629 |
| 6 | Birita Debes | Flot | 100 m rygg | 1:06.58 | 626 |
| 7 | Birita Debes | Flot | 200 m frí | 2:12.72 | 625 |
| 8 | Cecilia Eysturdal | Ægir | 400 m frí | 4:38.69 | 625 |
| 9 | Monika Biskopstø | Ægir | 400 m frí | 4:38.70 | 625 |
| 10 | Andrass Thomsen | HS | 400 m frí | 4:13.01 | 623 |
| 11 | Cecilia Eysturdal | Ægir | 200 m frí | 2:13.18 | 619 |
| 12 | Birita Debes | Flot | 100 m blandað | 1:09.78 | 615 |
| 13 | Monika Biskopstø | Ægir | 200 m frí | 2:13.50 | 614 |
| 14 | Magnus Jákupsson | HS | 200 m rygg | 2:09.14 | 610 |
| 15 | Magnus Jákupsson | HS | 50 m rygg | 0:27.40 | 605 |
| 16 | Birita Debes | Flot | 200 m rygg | 2:25.59 | 601 |
| 17 | Magnus Jákupsson | HS | 100 m frí | 0:54.56 | 601 |
| 18 | Magnus Jákupsson | HS | 50 m firvald | 0:26.68 | 600 |